## Christian Olsen

**f. 26.07.1946 d. 15.12.2006**

**in memoriam**

*Nú kalt fer lot um fjallatind,*
*nú myrkt er millum fjalla,*
*nú aftur hvarv ein vinarmynd,*
*nú Kristian mátti falla.*

---

*Tú vart so livandi í dáð,*
*tú vart so ráðasnúgvur,*
*tú átti í tær hesa trá,*
*í verk' at vera trúgvur.*

*Tú vinur okkar alra var,*
*sum innan ferðavinnu,*
*ein virknan lut í leiki bar,*
*at flyta við oss finnu.*

*Vit virða teg, at við tú var*
*eitt grev í okkar garði,*
*og tína byrðu fróður bar,*
*so eftir stendur varði.*

*Sum minni um ein megnarmann,*
*ið inti avrik stór,*
*til sóttin svára feldi hann,*
*og hann til fedrar fór.*

---

*For Kristiani vit lýsa frið,*
*ov brátt hann fór á ferð,*
*at leita upp hitt evsta mið,*
*har ævinleikin er.*

*For tykkum, sum hann vardi av,*
*vit biðja, at tit finna,*
*at Hann, sum Kristian' lívið gav,*
*Hann sorg kann tykkum linna.*

**Kunningarstovurnar**



## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Christiani Olsen, Klaksvík**, fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi í dag kl. 18 heim í Christianskirkjuna. Jarðarferðin verður týsdagin kl. 13.

**Svenn Askham, Tórshavn**, andaðist á Umlættingarheiminum 17. desember, 74 ára gamal. Bønarhald veður í Landssjúkrahúskapellinum týsdagin kl. 16. Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum mikudagin kl. 14.

**Kristin Holm, Nólsoy**, andaðist sunnudagin 59 ára gamal. Kistan fer úr landssjúkrahúskapellinum týsdagin kl. 14. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Margit Jacobsen, Nólsoy**, andaðist á Landssjúkrahúsinum hósdagin, 62 ára gomul. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum sunnudagin kl. 17.30. Jarðarferðin verður úr heiminum í Nólsoy mánadagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Margit, kunnu lata Nólsoyar kirkju eina peningagávu. Konta í peningastovnunum.

# Sørvágs kommuna nýggjan brandbil




Sørvágs kommuna hevur fingið nýggjan brandbil. Talan er um ein Volvo FM12 (4x4) við 340 hk motori.

Bilurin er keyptur frá VR-Bilar í Havn og er uppbygdur hjá »Rosenbauer« í Eysturríki og hjá HMK Ringe Karrosseri í Ringe, Danmark.

Bilurin verður drivin av bæði for- og bakhjólunum ger og er útgjørdur til at koyra allastaðni og í øllum veðri. Hann skal eisini kunna koyra til Bø og Gásadals á vetrardegi.

Volvo bilurin er útgjørdur við nýtímans klippiútgerð, roykkavaraútgerð, ið er keypt frá Fønix í Havn. Eisini hevur bilurin tvær hátrýstslangur á 70 m hvør. Hátrýstdysur framman, sum t.d. kunnu nýtast til at spula olju burtur av vegnum. Eisini er el-generator og útgerð til arbeiðsstreym er til taks í bilinum, um ikki onnur elveiting er nærhendis.

Bilurin rúmar átta sløkkiliðsmonnum, har fýra roykkavarar gera seg til reiðar í bilinum. Hesir hava við nýggju útgerðini fingið radioútgerð, so teir kunnu samskifta við restina av liðnum, meðan roykkavað verður. Tangarnir rúma knappar 3.000 litrum av vatni, og skúmblandari er somuleiðis í bilinum.

Bilurin hevur eisini spæl at toga akfør, sum eru farin út av vegnum ella í samband við t.d ferðsluóhapp.

Eftir ætlan verður farið undir at byggja nýggja brandstøð í bygdini, tá núverandi støð ikki rúmar nýggja bilinum. Til nýggja støðin er klár, kemur bilurin at standa í leigaðum hølum á bryggjuni í Sørvági. Gamli bilurin, ein Toyota Hiace frá 1984, ið einans hevur koyrt 4.600 km verður framvegis knýttur at sløkkiliðnum.

Við nýggja bilinum hjá Sørvágs kommunu eru Vágar væl stillaðar í samband við tilbúgving. Tá Vágatunnilin lat upp, fekk Miðvágs-Sandavágs Sløkkilið eisini nýggjan brandbil.

Brandbilurin verður sýndur fram fyri almenninginum í Sørvági mikudagin frá kl. 17 til 18. Eftir tað fer bilurin á framvísingarferð til bygdirnar fyri vestan, Bø og Gásadal.

## Tøkk

Øllum tykkum, gleddu meg á 70 ára føðingardegnum og sum hjálptu til at gera mær dagin so hugnaligan, takki eg hjartaliga.
Takk fyri gávur, blómur, fjarrit og uppringingar.
Eg ynski tykkum øllum eini gleðilig jól og eitt vælsignað nýggjár.

**Blíðar heilsanir**
**Hergerð Hansen í Vági**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri pápi, verpápi og abbi okkara

**Svenn Askham**

frá Tórshavn

andaðist á Umlættingarheiminum 17. desembur 74 ára gamal.
Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum týsdagin kl.16.00
Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum mikudagin kl.14.00

*Familjunnar vegna*
**Palli, Heðin og Ingun v/fam.**

**Prógv**

2. novembur 2006 tók Hans Jacob Kollslíð, Skála, prógv sum M.Sc. í International Fisheries Management á Norges fiskerihøgskole, Universitetet i Tromsø.

Tann 21. desembur fekk Bárður Johannesen handað prógv í Byggifrøði á altjóðari linju við Københavns Erhvervs Akademi. Útbúgvingin ber enska heitið: Constructing Architecture, og hon tekur 3½ ár. Bárður er sonur Daniu og Petur Hans Johannesen, og er uppvaksin á Argjum.

**Dagurin**

**19. desember. Nemesius**, deyður umleið ár 250. Um halga mannin Nemesius sigur halgisøgan, at hann einaferð varð lagdur undir stuldur. Men tá ið hann kundi prógva, at hann var ósekur, varð hann ákærdur fyri at vera kristin og tikin av døgum.